# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:


Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo

## Nýtt føroyskt met

Birita Debes, Flot, setti nýtt føroyskt met í 50 metra firvald undir World Cup-kappingini í Stokkhólmi. Tíðin hjá Biritu Debes 29.08 sekund. Tíðin var tríggjar hundraðpartar betri enn gamla metið, sum Shaila millum Garðarnar átti. Tað setti hon, tá hon vann gull á oyggjaleikunum á Álandi við tíðini 29.11 sekund. Birita Debes kláraði eisini kravtíðina til Oyggjaleikirnar við hesu tíðini.



**Eg veit ikki við vissu, um eg spæli aftur**

RÓGVI JACOBSEN, FÓTBÓLTSSPÆLARI

**Tað vísti seg, at KÍF-kvinnurnar vóru meira uppsettar og klárar enn vit**

KATRIN OLSEN, TERNAN



**Hetta hava verið tvey øgiliga krevjandi ár, tí ein slík útbúgving fer við nógvari tíð og orku**

JÓGVAN MARTIN OLSEN, FÓTBÓLTSVENJARI



*Hóast Pál ikki megnaði at hótta Rouault, so hevur vágbingurin fingið nógv flott svimji úrslit*

# Rouault var nógv betri

**SVIMJING** Seks heiðursmerki í sjey dagar var úrtøkan hjá Páli Joensen í World Cup seinastu vikuna. Um vikuskiftið vann vágbingurin bronsu og silvur

Uni Holm Johannesen

Tað eydnaðist ikki Páli Joensen at leggja Sebastian Rouault aftur sum seg.

Tað var annars dysturin millum føroyingin og fraklendingin, sum tey flestu gleddu seg til.

Teir báðir kappaðust í EM-undankappingini í Budapest í summar.

Í Stokkhólmi í gjár var Rouault aftur skjótari á teimum 1500 metrunum.

Fraklendingurin vann greitt.

Tíðin hjá Rouault var 14:37.94. Tað var besta tíðin á hesum teinunum í ár.

Pál kom á mál við tíðini 14:54.21.

### Seks heiðursmerki

Pál Joensen hevur tikið lut í trimum World Cup-stevnum og seks kappingum seinastu vikuna. Vágbingurin hevur vunnið eitt heiðursmerki í øllum kappingunum.

Hann vann gull í 400 metra frí og 1500 metra frí í Moskva í farnu viku.

Svimjisamband Føroya sigur, at tey eru sera væl nøgd við úrslitini hjá Páli.

Kappingarnar hava verið ein liður í fyrireikingunum til HM-kappingina í Dubai í desember.

*uni@sosialurin.fo*

## Klumman:

# Fótbóltur, ferðing, ferja, forðing, fiasko

Heri Simonsen

Menn og kvinnur í sunnaru helvt í Suðuroynni høvdu lagt nógv fyri at geva fótbóltsspælarunum kring landið eina jaliga uppliving, aftaná eitt drúgt og strævið kappingarár. Reika var fyri einum stórfingnum tiltaki, nevnliga innandura FM í fótbólti, har spælarnir eisini skuldu møtast í veitslulagi um kvøldið og taka sær av løttum, aftaná lokna innandura FM-kapping í fótbólti. Hæddarpunktið á veitsluni skuldi so verða, at spælarnir valdu "ársins spælara" – eina sonevnda "Player´s player award". Tilmeldingarnar komu eisini í stórum tali, og lagt var upp til tað stóra endabrakið í Vágshøll.

Fyrireikarnir bobláðu av optimismu, tá vit høvdu samrøðu við tey á Rás2 seinast í oktober, og forvæntningarnar vóru bygdar upp til henda langa, spennandi leygardagin suðuri í Vági, tá tann føroyska fótbóltsfamiljan skuldi møtast undir øðrum kørmum. Men tíverri gjørdist tað sum ein klassisk donsk máliska boðar frá, at: "Forventningens glæde er den største". Krop á kroppi meldaðu liðini norðanfjørðs avboð til innandura FM í fótbólti, aftaná at hava meldað til kappingina fyrst. Fyrireikarnir, sum høvdu lagt nógv fyri, stóðu eftir við einum nærum blankaðum tilmeldingarlista, og einari verkætlan sum var vorðin ógvuliga minimalistisk. Bert kvinnurnar hjá AB, og mennirnir hjá B68 og Undrinum vildu njóta tað tiltikna stóra gestablídni, sum suðuroyingar eru kendir fyri. Øll onnur lið norðanfjørðs meldaðu pass, áðrenn kortini vóru blandað.

Fótbólturin tapti tí ferðing við einari ferju var ein forðing, og FM í fótbólti gjørdist tí ein fiasko, tá um prestisju ræður. Ikki tað, suðuroyarliðini høvdu saman við AB, B68 og Undrinum ein góðan leygardag í Vágshøll við eftirfylgjandi dansi. Men tað er so hjartaliga synd í stríðskvinnuni og stríðsmanninum, sum so hjartagóð løgdu so nógv fyri, at tann føroyska fótbóltsfamiljan kundi koma saman og fáa ein veitslukendan endabrest. FC Suðuroy hevði uppiborið eina succés-uppliving aftaná tað fyrsta kappingarárið í bestu føroysku fótbóltsdeildini, men tey mugu bara ásanna, at suðuroyingar eru við skerdan lut, eisini tá ein kýtir seg fyri at geva øllum "norðingunom" eina jaliga uppliving, og sýna teimum stórt gestablídni. Synd og harmiligt – eingin kann lasta FC Suðuroy, um tey í framtíðini ikki tora í holt við eitt slíkt tiltak aftur!